Løgmansskrivstovan

Dagfesting: 28. mars 2023
Málsnummar: 23/02957
Málsviðgjørt: SR
Ummælistíð: 13.03.23-17.03.23
Eftirkannað: 20.03.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum
(Yvirtøka av málsøkjunum sjóuppmerking og vitaverk)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 151 frá 12. desember 2018, verður í § 1, stk. 2, nr. 18 “, sjóuppmerking og vitaverk” strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juni 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrið hevur gjørt av at leggja fyri Løgtingið uppskot um at yvirtaka málsøkini sjóuppmerking og vitaverk, undir hesum siglingarskipanir (navigationssystemer) og skipsrov sambært § 1, stk. 2, nr. 18, í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum.

Yvirtøka av vitaverkinum er avtalað í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu. Sjóuppmerking hevur tætt tilknýti til vitaverk og onnur øki, sum eru á føroyskum hondum, undir hesum trygd á sjónum, sum varð yvirtikið í 2002, loðslógarøkið, sum varð yvirtikið í 2011 og sjókortøkið, sum varð yvirtikið í 2018.

Samgonguskjalið nevnir í fleiri umførum, at sjóvinnuøkið í Føroyum skal mennast. Føroyar skulu bjóða fram fjølbroyttar tænastur til vaksandi skipaferðsluna á okkara leiðum, sjótilbúgvingin skal styrkjast, setast skulu strangastu krøv um umhvørvisvernd, arbeiðsumhvørvi og trygd á sjónum; mennast skal ein føroysk shippingvinna, sum gongur á odda við burðardygd.

Føroyar eru sjófarandi tjóð, og sum liður í at styrkja og menna sjóvinnuøkið í Føroyum, er endamálið við uppskotinum at formliga yvirtaka málsøkini sjóuppmerking og vitaverk, sum føroysk sermál sambært § 1, stk. 2, nr. 18, í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum. Lagt verður upp til at fara fram soleiðis, at Løgtingið samtykkir yvirtøku av málsøkjunum í hesi tingsetuni, tó at málsøkini verða yvirtikin 1. juni 2024. Í tíðarskeiðinum fram til yvirtøkuna fer umsitingin at fyrireika, dagføra lóggávu og nema sær neyðugu førleikarnar til at røkja ymsu uppgávurnar í samstarvi við Søfartsstyrelsen og aðrar viðkomandi myndugleikar.

1.2. Galdandi lóggáva

Málsøkini sjóuppmerking og vitaverk, eru í føroyskum høpi í stóran mun skipað eftir vegleiðing frá Søfartsstyrelsen uttan greiða lóggávu, sum viðvíkur økjunum. Fyri sjóuppmerking er í gildi bekendtgørelse nr. 229 af 4. april 1989 om afmærkning m.v. i dansk afmærkningsområde, og lov nr. 68 af 29. marts 1893 om Afstaaelse af Grund til Fyranlæg m.m. er galdandi á vitaøkinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at samtykkja yvirtøku av málsøkjunum í hesi tingsetuni, soleiðis at umsitingin undir greiðum kørmum kann fara undir arbeiðið at yvirtaka málsøkini 1. juni 2024.

Við yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverki eru lóggávuvaldið, útinnandi valdið og fíggjarliga ábyrgdin á hesum økjum yvirtikin sum føroysk sermál.

Yvirtøkan fevnir umframt um 24 vitar, sum verða riknir frá gomlu Loranstøðini á Eiði. Yvirtøkan fevnir harafturat um onnur sjómerki, starvsfólk, alla rakstrarútgerð, sum er knýtt at vitunum, og rakstrarútgerð í DGPS-støðini á Bøllureyni. Føroyskir myndugleikar yvirtaka eisini ábyrgdina av avtalum og samstarvinum, sum Søfartsstyrelsen hevur við m.a. Arktisk Kommando, MRCC og Landsverk, undir hesum ábyrgdina av teimum uppgávum, sum avtalurnar fevna um. Arbeitt verður fram ímóti, at bygningarnir, sum eru tætt knýttir at rakstrinum av vitaverkinum, verða latnir føroyskum myndugleikum í sambandi við yvirtøkuna av vitaverkinum. Hetta skal leggjast fyri Folketingets Finansudvalg.

Í sambandi við yvirtøkuna verður løgtingslóg um trygd á sjónum broytt soleiðis, at dagførdar reglur um sjóuppmerking eru í gildi í Føroyum, og heimild at skipa økið er hjá føroyskum myndugleikum. Við yvirtøkuni verður økið um bjarging av skipsrovum o.tíl., ið eru til vanda ella veruligan ampa fyri sigling og fiskiskap, sum í dag er reglubundið við Norsku lóg og rættarsiðvenju, eisini yvirtikið.

Sambært § 5 í yvirtøkulógini, sum er løgtingslóg nr. 79 frá 12. mai 2005, og sambært § 13 í heimastýrislógini, sum er lov nr. 11 frá 31. mars 1948, stendur verandi lóggáva á yvirtikna økinum við, til broytingar verða gjørdar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verða málsøkini sjóuppmerking og vitaverk formliga yvirtikin sum føroysk sermál. Fyri at tryggja, at yvirtøkan fer fram á skilagóðan hátt, og økini verða væl rikin eftir yvirtøkuna, fer yvirtøkan fram 1. juni 2024.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Arktisk Kommando, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Kommunufelagnum, Landsverki, MRCC, Ríkisumboðnum, Sjóvinnustýrinum, Umhvørvismálaráðnum, Umhvørvisstovuni, Vinnustovninum, Vinnuhúsinum og VØRN.

Ummæli eru innkomin frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Landsverki, Umhvørvisstovuni og Vinnuhúsinum.

Vinnuhúsið hevur boðað frá, at tey ikki hava viðmerkingar, og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur boðað frá, at tey ikki hava nakað at leggja afturat ummælinum frá Landsverki.

Umhvørvisstovan hevur boðað frá, at tey ikki hava viðmerkingar til uppskotið.
Umhvørvisstovan vísti tó á, at tá ið arbeiðið at fyrireika sjálva yvirtøkuna byrjar, væntar Umhvørvisstovan at verða hoyrd. Í fyrireikingunum at yvirtaka málsøkini fer Uttanríkis- og vinnumálaráðið at seta seg í samband við Umhvørvisstovuna og aðrar viðkomandi partar.

Heilsufrøðiliga starvsstovan vísti í sínum ummæli á, at tey ikki hava viðmerkingar til yvirtøku av málsøkjunum. Heilsufrøðiliga starvsstovan vísti í sínum ummæli á, at nógv arbeiði verður av at skipa sjóupmerking og sjókort í sambandi við aling. Í sambandi við fyrireikingarnar at yvirtaka málsøkini fer Uttanríkis- og vinnumálaráðið at lýsa og viðgera samspælið millum myndugleikar og partar, sum knýta seg at málsøkinum, soleiðis at málsøkini eru skipað á skilagóðan hátt, tá ið tey verða yvirtikin.

Í sínum ummæli metir Landsverk kostnaðin til rakstur at vera nakað væl hægri enn metingina hjá Søfartsstyrelsen. Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer í næstum at umrøða fleiri viðurskifti í sambandi við yvirtøkuna við Søfartsstyrelsen, m.a. kostnaðarmetingina. Endamálið er at tryggja, at tað í sambandi við fíggjarlógina fyri 2024 verður sett hóskandi upphædd av til at fyrisita sjóuppmerking og vitaverk á ein fullgóðan hátt frá 1. juni 2024 at rokna.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Søfartsstyrelsen hevur eftir áheitan frá landsstýrinum gjørt eina kostnaðarmeting í sambandi við yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverki. Søfartsstyrelsen hevur upplýst, at í 2022 var samlaði kostnaðurin fyri rakstur av vitaverkinum í Føroyum 3,75 milliónir krónur. Hetta er nakað lægri enn mett, tá ið tað áður hevur verið umrøtt at taka yvir sjóuppmerking og vitaverk. Afturat hesum kemur raksturin av DGPS støðini á Bøllureyni á umleið 20.000 krónur.

Í hesum sambandi skal verða víst á, at Landsverk í sínum ummæli metir kostnaðin til rakstur at vera nakað væl hægri. Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer í næstum at umrøða fleiri viðurskifti í sambandi við yvirtøkuna við Søfartsstyrelsen, m.a. kostnaðarmetingina. Endamálið er at tryggja, at tað í sambandi við fíggjarlógina fyri 2024 verður sett hóskandi upphædd av til at fyrisita sjóuppmerking og vitaverk á ein fullgóðan hátt frá 1. juni 2024 at rokna.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

Sjóuppmerking

At umsita sjóuppmerking verður mett at krevja arbeiðsorku til fyrisitingarligar arbeiðsuppgávur, viðlíkahald, eftirlit og luttøku í altjóða samstarvi. Millum annað skulu skipanir eins og *Efterretninger for søfarende* verða settar í verk og virka 1. juni 2024, tá ið málsøkið verður yvirtikið.

Vitaverk

At umsita vitaverk verður mett at krevja tvey ársverk umframt tíggju vitapassarar, sum fáa samsýning svarandi til eitt ársverk.

Landsstýrið yvirtekur ognir fyri umleið 1 million krónur, ið eru knýttar at málsøkjunum. Harafturat koma tænastubústaðirnir til starvsfólk á Eiði, á Borðuni og í Mykinesi og bygningarnir, sum vórðu brúktir til Loranstøð, sum formliga ikki eru partur av yvirtøkuni, men sum eftir ætlan verða latnir føroyskum myndugleikum eftir avtalu við danskar myndugleikar og við heimild frá Folketingets Finansudvalg. Kostnaðarmetingin frá Søfartsstyrelsen fevnir eisini um rakstur og viðlíkahald av hesum bygningum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Við yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverki fylgja uppgávur, sum føroyskir myndugleikar frameftir skulu loysa. Uppgávurnar fevna m.a. um at viðgera umsóknir um sjóuppmerkingar, at halda ognir við líka, luttaka í altjóða samstarvi, dagføra lóggávu og samskipa uppgávur millum ymiskar myndugleikar. Eisini fær føroyskur myndugleiki ábyrgd av at senda út siglingarávaringar, at almannakunngera broytingar í sjóuppmerking og geva út nautisk tíðarrit, sum koma í staðin fyri tíðarritini, Efterretning for Søfarende, Dansk Fyrliste og Afmærkning af danske farvande.

Skipan um fráboðanir til sjófólk eins og *Efterretninger for søfarende* skal vera virkandi á yvirtøkudegnum. Í skipanina fara siglingarávaringar, sum skip og bátar hava skyldu at seta seg inn í. Onkrar av fráboðanunum eru varandi ella galdandi í longri tíð og skulu skrivast í sjókort, sum Umhvørvisstovan umsitur. Myndugleikin skal samskipa siglingarávaringar og hevur ábyrgd av, at siglingarávaringar verða lýstar rættstundis og á røttum stað.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Sjóuppmerking, sum skal tryggja trygga ferðslu á sjónum, er grundað á altjóða sáttmálar, rættarsiðvenjur ella tilmæli. Altjóða verður sostatt miðað ímóti, at sjóuppmerking er eins í øllum heiminum. IALA (International Association of Maritime Aids to Navigation and Lighthouse Authorities), sum hevur til endamáls at einshátta sjóuppmerking á havinum, og IMO-sáttmálin og SOLAS (International Convention for the Safety of Life at Sea), sum Føroyar hava staðfest, fevna um reglur um at senda út siglingarávaringar, um at stovna sjóuppmerkingar og um at almannakunngera broytingar í sjóuppmerking.

Við yvirtøku av økinum, yvirtaka føroyskir myndugleikar ábyrgdina av, at altjóða reglur o.a. um sjóuppmerking – sum sjóuppmerking í Føroyum longu í dag livir upp til – verða fylgdar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
   Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Við yvirtøkuni fær landsstýrismaðurin heimildirnar, sum higartil hava ligið hjá donskum ráðharra.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við hesi grein verður yvirtøkan formliga framd.

Til § 2
Yvirtøkan er sett at fara fram 1. juni 2024. Føroyskir myndugleikar fáa sostatt stundir at fyrireika yvirtøkuna og nema sær neyðugu vitanina at taka við ábyrgdini av økjunum.

Í tíðarskeiðinum fram til yvirtøkuna fer Uttanríkis- og vinnumálaráðið saman við viðkomandi donskum og føroyskum myndugleikum at fyrireika yvirtøkuna, undir hesum at avgera, hvør myndugleiki fær ábyrgd av økjunum, og at seta í gildi reglur, sum kunnu setast í gildi samstundis, sum málsøkini verða yvirtikin.

Løgmansskrivstovan, 28. mars 2023

Aksel V. Johannesen
løgmaður

/ Sjúrður Rasmussen kst.

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur.
Fylgiskjal 2: Notat af 17.03.2023 om spørgsmål i forbindelse med færøsk overtagelse af sagsområder på Søfartsstyrelsens område.
Fylgiskjal 3: Notat af 17.03.2023 om internationale aftaler og forpligtelser samt mødefora i for-bindelse med evt. overtagelse af sagsområder på Søfartsstyrelsens område.
Fylgiskjal 4: Oversigt over anlæg Færøerne.
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Umhvørvisstovuni 16.03.2023 av uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum. (Yvirtøka av málsøkjunum, sjóuppmerking og vitaverk).
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Vinnuhúsinum 17.03.2023 av uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkjunum, sjóuppmerking og vitaverk)
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Landsverki 17.03.2023 av uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkjunum, sjóuppmerking og vitaverk)
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni 19.03.2023 av uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkjunum, sjóuppmerking og vitaverk).
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Fiski- og samferðslumálaráðnum 20.03.2023 av uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkjunum, sjóuppmerking og vitaverk).